HEILSUMÁLARÁÐIÐ

1. FEBRUAR 2024



# TILMÆLI TIL LANDSSTÝRISKVINNUNA UM BROYTINGAR Í PARTI B OG ÁVÍSAR ÁSETINGAR Í PARTI A Í LØGTINGSLÓG UM APOTEKSVERKIÐ OG HEILIVÁG

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 304050 • hmr@hmr.fo

# Inngangur

### *Fororð*

Apoteksøkið er í støðugari broyting og menning, og umráðandi er at okkara lítla samfelag, sum er landafrøðiliga fjart frá øðrum londum, hevur eitt framhaldandi vælskipað apoteksverk.

Apoteksverkið í Føroyum er skipað í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág. Seinast arbeitt hevur verið við størri lógarbroytingum á økinum var í 1988. Tá varð nýggj løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág samtykt. Hon kom í gildi 1. januar 1989. Lógin um apoteksverkið og heilivág er býtt upp í tveir partar. Partur A, sum fevnir um bygnaðin og skipan av apoteksverkinum og Partur B, sum fevnir um sølu, framleiðslu og útbýting av heilivágssløgum o.a.

Í 2020 var ein arbeiðsbólkur settur til millum annað at endurskoða part B í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág. Undir arbeiðinum varð arbeiðsbólkurin samdur um, at tað var mest átrokandi at fara í holt við at endurnýggja eina kunngerð. Ein endurnýggjað útgáva av hesari kunngerð kom í gildi í 1. oktober 2022[1].

Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum hevur gjørt av, at arbeiðsbólkurin skal halda fram við sínum arbeiði. Tó varð arbeiðssetningurin víðkaður til eisini at fevna um ávísar ásetingar í parti A í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág.

### *Arbeiðssetningur*

- Gera eina lýsing av, hvørjar broytingar tørvur er á at gera í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2020, parti B og lutvíst parti A
- Gera tilmæli um, hvussu broytingarnar skulu gerast, við dagføringum í galdandi lóg, við broytingum í galdandi lóg ella við nýggjari lóg
- Meta um tørvur er á dagføringum, broytingum og/ella nýggjum kunngerðum, sum hava heimild í lógini um apoteksverki og heilivág.

[1] https://logir.fo/Kunngerd/124-fra-07-09-2022-um-forskriftir-heilivagsbilegging-og-skamtlutan-av-heilivagi

Arbeiðsbólkurin handar eitt tilmæli til Margit Stórá, landsstýriskvinnu, har omanfyrinevndu viðurskifti eru lýst, í seinasta lagi 1. februar 2024.

### *Arbeiðsbólkur*

Andreas Sjóvará, formaður í bólkinum og fulltrúi, Heilsumálaráðið
Hjalti Gunnarstein, landsapotekari
Ragnar Stakksund, deildarleiðari, Tjaldurs Apotek
Nanna Knudsen, apotekari, Norðoya Apotek
Sjúrður Rasmussen, løgfrøðiligur ráðgevi hjá apoteksverkinum
Irena Nolsø, fulltrúi, Heilsumálaráðið

### *Arbeiðstilgongd*

Arbeiðið hevur verið skipað við at savnað inn tilfar frá áhugapørtum og við íblástri frá heilivágslógum í øðrum norðurlondum, serliga danskari og íslendskari lóggávu.

Fundir hava verið við:

- Landslæknan og stjóran í Fólkaheilsustýrinum, um heilivágsgoymslur á ellisheimi, viðgerðarstovnum og aðrastaðni, tann 23. november 2023
- Magnu Eliana Mørkøre, sjúkrarøktarfrøðing í VEKS, Naina Túgvustein, dygdarmennara í Tórshavnar kommunu, og Jónvør Christiansen, dygdarmennara í Nánd, um heilivágsgoymslur á ellisheimi, tann 29. november 2023
- Ann Winther Jensen, um misnýtsla av rúsandi ADHD heilivági, tann 7. november 2023
- Petur Oluf Joensen, apoteksverkið, um viðgerðarstovnar og ovurnýtsla av heilivági, tann 13. september 2023
- Katrin Gaard og Rannvá Bjarkadóttir Mohr, Heilsumálaráðið, um virkisøki – heilivágslóg og roykilóg, tann 28. november 2023

Skrivligir fyrispurningar hava verið sendir:

- Blákrossheiminum
- Kriminalforsorgini
- Løgmálaráðnum
- Føroya Politi

Ávís tilmæli hava verið send til hoyringar hjá:

- Sjúkrahúsverkinum
- Heilsutrygd
- Fólkaheilsustýrinum
- TAKS
- Sjóvinnustýrinum
- Landslæknanum
- Landsdjóralæknanum
- Læknafelagnum Føroya
- Kommunulæknafelagnum Føroya
- Serlæknafelagnum Føroya
- Felagnum fyri Yngri læknar

- Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
- Tannlæknafelagnum
- ADHD-felagnum

Arbeiðsbólkurin hevur havt 4 innanhýsis fundir, tann 14. juni 2023, 14. november 2023, 4. januar 2024 og 24. januar 2024.

# Samandráttur av tilmælum

*Tilmæli um broytingar í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág, parti B og lutvíst parti A*


1. *Loyvi hjá apoteksverkinum at seta í starv lækna ella annað heilsustarvsfólk at koppseta fyri apoteksverkið* ........ 6
2. Skipað verður fyri heilivági til borgarar, ið liggja til tað síðsta ........ 10
3. Einkarætturin hjá apoteksverkinum at innflyta o.a. heilivág og undantøk til einkarættin ........ 12
   - 3.1. Einkarætturin hjá apoteksverkinum at innflyta koppingarevni og serum ........ 12
   - 3.2. Loyvi hjá heilsustarvsfólki at innflyta heilivág í sambandi við eina tilbúgving ........ 13
   - 3.3. At nágreina, at reiðarar og skiparar hava loyvi at hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu umborð og í ávísum føri at keypa og innflyta heilivág, tá skipið leggur at í útlendskum havnum ........ 14
   - 3.4. Sjúkrahús og líknandi viðgerðandi stovnar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í viðgerðini ........ 15
   - 3.5. At nágreina at læknar, djóralæknar og tannlæknar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í teirra starvi. Eftirlit skal havast við hesum ........ 17
   - 3.6. Loyvið hjá Kriminalforsorgini í Føroyum at handfara heilivág, sum verður nýttur í sambandi við viðgerð av fongslaðum persónum ........ 18
   - 3.7. At nágreina loyvið hjá útbúgvingarstovnum og sveisaravirkum at bíleggja heilivág til nýtslu í teirra yrki. Harumframt at nágreina loyvið hjá fiskaheilsulívfrøðingum at ávísa heilivág til nýtslu í alivinnuni.. 19
4. At dagføra heilivágshugtakið ........ 20

5. At strika hugtakið “farmaseutiskur sertilbúningur” ..................................... 22
6. At dagføra kapittulin um lýsingar um heilivág.............................................. 23
7. At áseta skyldu hjá heilsustarvsfólki at boða Landsapotekaranum frá hjáárinum, sum eru íkomin orsakað av heilivági.......................................................... 24

*Tilmæli um, hvussu broytingarnar skulu gerast*

At býta lógina sundur í tvær serstakar lógir .......................................................... 26

*Tilmæli um nýggjar kunngerðir og dagføringar og broytingar í verandi kunngerðum*

1. At seta í gildi kunngerð um at handfara heilivág á sjúkrahúsi og øðrum viðgerðarstovnum........................................................................... 27
2. At seta í gildi kunngerð um møguleikan hjá einstaklingum at innflyta heilivág 27
3. At dagføra kunngerð nr. 13 frá 31. januar 1994 um brúkarainnpakking til sertilbúningarheilivág.......................................................................... 30
4. At dagføra kunngerð nr. 85 frá 12. juni 2013 um at undantaka náttúruheilivág, vitamin- og mineralsløg og homøopatiskan heilivág frá løgtingslógini um apoteksverkið og heilivág........................................................................ 30
5. At dagføra kunngerð nr. 113 frá 1. juli 1992 um áseting av søluprísi á heilivági........................................................................................... 32
6. At leggja kunngerð nr. 84 frá 11. august 1989 um dygd í heilivági og kunngerð nr. 94 frá 15. august 2023 um heilivágsskrá og fyrimyndarreglur fyri heilivág saman í eina kunngerð........................................................................ 32
7. At dagføra kunngerð nr. 69 frá 26. juni 1991 um skrásetingarráð viðvíkjandi farmaseutiskum tilbúningi, sum broytt við kunngerð nr. 38 frá 6. mai 2015.... 32
8. At dagføra kunngerð nr. 124 frá 7. september 2022 um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtlutan av heilivági............................................. 33

# Tilmæli um broytingar í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág, parti B og lutvíst parti A

## 1. *Loyvi hjá apoteksverkinum at seta í starv lækna ella annað heilsustarvsfólk at koppseta fyri apoteksverkið*

*Verandi lóg*

Í § 4, stk. 1 í verandi lóg um apoteksverkið og heilivág er eitt forboð ímóti, at apotekari kann vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni. Innihaldsliga svarar ásetingin til ásetingina í donsku lógini frá 1984[2], og hevur sín uppruna í donsku apotekaralógini frá 1932[3]. Tað stendur í viðmerkingunum til ásetingina, at hon hevur til endamáls at fyribyrgja møguligum misbrúki[4].

Ásetingin hevur við sær, at apotekari ikki kann ávísa heilivág, sum viðkomandi apotekari eftir hetta sjálvur kann selja, og ein lækni ikki kann selja heilivág, sum viðkomandi lækni sjálvur hevur ávíst. Ásetingin kemur til lívs tað, at apotekari – ella lækni – misbrúkar heilivág við vinningi fyri eyga.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki mett, um ásetingin í síni heild er viðkomandi at varðveita í lógini. Arbeiðsbólkurin heldur, at hesin spurningurin eigur at viðgerast, tá allur partur A í lógini verður endurskoðaður. Arbeiðsbólkurin mælir tó til, at gera eitt undantak til ásetingina, sí meira um hetta í tilmælinum til hetta punkt.

Apoteksskipanin í Danmark byggir á, at privatir loyvishavarar reka apotek sum eina privata fyritøku við teimum avmarkingum, sum eru settar av avvarðandi myndugleikum. Endamálið við ásetingini er serliga viðkomandi í Danmark, av tí, at danska stjórnin ikki kann stýra apotekunum við at geva tænastuboð o.a., og kann hetta hava við sær ein øktan vanda fyri óynsktari nýtslu.

Ongin apotekari í Føroyum ávísir heilivág og samstundis forvinnur sær sjálvum pening við at selja heilivágin. Føroyska apoteksverkið er alment og møguligt avlop av sølu av heilivági fer ikki til apotekaran persónliga, men fellur aftur til landið. Apotekari fær ikki nakran persónligan

[2] nr. 279 af 6. juni 1984 om apoteksvirksomhed
[3] nr. 107 af 31. marts 1932 om apotekervæsenet
[4] Rigsdagstidende 1931-32, tillæg A, spalte 3512

vinning av meirsølu av heilivági sum kemst av, at hann er í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni. Hóast hetta, kann apotekari hava ein áhuga í at selja so nógvan heilivág sum til ber, soleiðis at partur av avlopinum kann brúkast til annað virksemi hjá apotekinum, áðrenn tað fellur aftur til landið.

Forboðið móti, at apotekari virkar sum lækni, tannlækni ella djóralækni er eitt persónligt forboð fyri apotekaran. Sambært § 8, stk. 1 er tað apotekarin, sum skipar fyri rakstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi ásetanum og givnum fyriskipanum, undir hesum at virka verður ikki sum lækni, tannlækni ella djóralækni á apotekinum. Hetta hevur við sær, at tað virksemi, sum starvsfólkið á apotekunum tekur sær av, er ein partur av persónligu ábyrgdini hjá apotekaranum. Forboðið í § 4 er tí galdandi fyri apotekaran og starvsfólk hjá apotekaranum.

Hetta merkir til dømis, at apotekari ikki kann seta læknar, tannlæknar ella djóralæknar í starv til tess at útinna lækna-, tannlækna ella djóralæknavirksemi, soleiðis at apotekari kann geva harraboð til hesi í stríð við § 4. Apotekari kann sostatt ikki seta ein lækna í starv at koppseta á apotekinum.

§ 4 forðar tó ikki fyri, at apotekari samstarvar við lækna á ymiskan hátt. Tó skal samstarvið hava støði í øðrum enn læknaligum virksemi. Til dømis kann lækni avtala við apotekara, at apotekarin letur høli ella starvsfólkaorku til ein lækna í sambandi við koppsetingar soleiðis, at starvsfólkið, á sama hátt sum hjálparfólk hjá læknum, kann koppseta á apotekum. Hetta er treytað av, at apotekarin ikki kann geva harraboð til læknan ella starvsfólkið, í mun til tað delegeraða virksemið. Tað má tí týðiliga avtalast, nær starvsfólkið virkar sum starvsfólk undir apotekaranum, og nær starvsfólkið virkar sum hjálparfólk undir læknanum. Hetta má eisini gerast týðiligt fyri viðkomandi starvsfólk.

### *Hugleiðingar hjá arbeiðsbólkinum*

Ein týðandi partur av smittuverjutilbúgvingini er at koppseta fyri smittandi sjúku. Lata fólk seg koppseta, fyribyrgir hetta sjúku og minkar um váðan fyri smittu. Gerst ein, ið er koppsett/ur, sjúk/ur, er sjúkan ikki líka hættislig. Fyri at røkka endamálinum við almenna koppsetingartilboðnum[5] er umráðandi, at ein so stórur partur sum gjørligt av borgarum í vandabólkum, lata seg koppseta. Leggjast kann aftrat, at heimsheilsustovnurin, WHO og ES hava sum mál, at 75 prosent av borgarum í vandabólkinum, ið eru í váða fyri at gerast álvarsliga sjúk, verða koppsett fyri influensu[6]. Leikluturin hjá apotekunum kann verða viðvirkandi til at fyribyrgja sjúku og koma tættari at málinum hjá ES og WHO.

Atkoma til tilboð um koppseting, hevur ávirkan á, hvussu nógv fólk velja at taka av tilboðnum um koppseting. Úrslit frá kanningum geva ábendingar um, at ein stutt leið til koppsetingarstaðið, stutt bíðitíð og møguleiki fyri at lata seg koppseta, uttan at bíleggja tíð ella við at bíleggja tíð talgilt, eru viðurskifti, sum økja sannlíkindini fyri at fólk lata seg koppseta[7].

Undir koronutíðini í Føroyum vísti tað seg at vera tørvur á at skipa tilboðið um koppseting øðrvísi. Fyrstu tíðina hevði Sjúkrahúsverkið ábyrgdina av og skipaði COVID-19

---

[5] Almenna koppsetingartilboðið er skipað við løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum

[6] https://www.ecdc.europa.eu/en/seasonal-influenza/prevention-and-control/vaccines/vaccination-strategies

[7] Sí Sundhedsstyrelsen, Erfaringsopsamling - Læringer fra udrulning af sæsonvaccinationsprogrammer 2022-2023, pkt. 4.5.4. “Borgernes brug og oplevelser af vaccinationstilbuddenes tilgængelighed” leinki: https://www.sst.dk/-/media/Udgivelser/2023/Vaccination/Erfaringsopsamling-saesonvaccinationsprogram-2022-2023.ashx?sc_lang=da&hash=91FFAFBCACA87FDD08BBC56FA9CEAAB3

koppsetingina. Koppsetingin fór fram á sjúkrahúsunum og starvsfólk frá Sjúkrahúsverkinum koppsettu á ellis- og røktarheimum o.s.fr. Seinni gjørdi COVID-19 koppsetingarbólkurin av, at koppsetingin, sum fór fram á sjúkrahúsunum, skuldi flytast til apotekini.

Av tí, at apoteksverkið ikki hevur heimild at koppseta og eingin lækni starvast í apoteksverkinum, koppsettu starvsfólkini í apoteksverkinum eftir delegatión frá serlækna í Sjúkrahúsverkinum. Saman við Fróðskaparsetrinum varð skipað fyri tveimum skeiðum, fyri starvsfólkum í apoteksverkinum, so tey høvdu neyðugar fakligar førleikar, áðrenn tey fóru undir at koppseta fyri COVID-19. Seinni var ábyrgdarbýtið broytt til, at Sjúkrahúsverkið saman við Heilsutrygd fingu ábyrgd av og skipaðu COVID-19 koppsetingina, sum fór fram hjá kommunulæknum og á apotekunum.

Royndirnar við koppseting fyri COVID-19 á apotekunum eru góðar. Nógv fólk tóku av tilboðnum um koppseting á apotekunum. Fyrimunir við koppseting á apotekunum eru, at stutt er hjá flestu fólkum at koma á eitt av teimum fýra apotekunum í landinum; fólk kunnu velja á hvørjum apoteki tey ynsktu at verða koppsett; koppsetingin fór fram uttanfyri vanliga arbeiðstíð hjá fólki, harumframt var tað lætt og ómakaleyst at bíleggja tíð til koppsetingina.

Í nógvum londum kring Føroyar er koppseting á apotekum ein natúrligur partur av heilsutænastunum. Í Danmark bjóða flestu apotekini koppseting fyri influensu og pneumokokk. Apotekini í Danmark hava í tíðarskeiðinum 1. oktober 2023 til 6. desember 2023 framt 1 millión ókeypis koppsetingar fyri influensu og COVID-19[8]. Umframt tey almennu koppsetingartilboðini, koppseta summi apotek eisini í sambandi við uttanlandsferðir og fyri helvitiseld. Apotekini vóru eisini ein týðandi partur, tá koppsetast skuldi fyri COVID-19. Líknandi gongd sæst aftur í fleiri øðrum londum sum til dømis Belgia, Estlandi, Frankaríki, Grikkalandi, Írlandi, Italia, Norra, Portugal, Sveis, Bretlandi, Týsklandi, USA og Avstralia. Royndir frá hesum londum vísa, at tá koppseting kann fara fram á apotekum, taka fleiri fólk av tilboðnum – serliga fólk í vandabólki[9].

Arbeiðsbólkurin heldur, at apotekini eiga at verða ein partur av almenna koppsetingartilboðnum í Føroyum. Hetta tí, at tað er lætt atkomuligt og stutt hjá flestu fólkum at koma á eitt av teimum fýra apotekunum í landinum. Harumframt vísa royndir, at økta atkoman til koppseting hevur við sær, at fleiri fólk lata seg koppseta. Møguleiki eigur tá at vera fyri at kunna lata seg koppseta samstundis, uttan at bíleggja tíð. Mett verður eisini, at tilfeingið hjá landinum verður gagnnýtt betri, um koppseting á apotekum er ein partur av almenna koppsetingartilboðnum í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin heldur, at apotekini sjálvstøðugt eiga at kunna bjóða fólkum í vandabólkum koppsetingar, fevndar av almenna koppsetingartilboðnum, uttan at tað er í stríð við § 4. Verður gjørt eitt undantak til § 4, fer hetta at gera tað lættari hjá apotekunum at bjóða koppsetingar til fólk. Hesin sjálvstøðugu leikluturin hjá apotekunum, má tó ikki elva til ovurnýtslu ella beina burtur ábyrgdina hjá læknanum. Undantakið skal einans fevna um koppsetingar, fevndar av almenna koppsetingartilboðnum.

*Tilmæli*
Mælt verður til, at ásett verður eitt undantak til forboðið móti at apotekari kann vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni.

[8] https://www.apotekerforeningen.dk/presse/pressemeddelelser/2023/en-mio-vaccinationer
[9] https://www.apotekerforeningen.dk/politik/det-mener-apotekerforeningen/vaccination-paa-apoteket-bidrager-til-at-flere-bliver-vaccineret

Mælt verður til, at apotekini fáa møguleika fyri at bjóða koppsetingar, fevndar av almenna koppsetingartilboðnum, við at gera avtalu við og seta í starv autoriserað heilsustarvsfólk, sum hava heimild til at koppseta og ávísa koppingarevni sambært autorisatiónslógini.

Lagt verður upp til, at apotek við hesum undantaki fáa møguleika fyri sjálvstøðugt at bjóða allar ella ávísar koppsetingar, fevndar av Løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum og kunngerðum, sum hava heimild í lógini. Apotek einsamalt ella saman við øðrum apotekum, kann gera avtalu við ella seta í starv eitt heilsustarvsfólk, sum kann ávísa koppingarevni og koppseta.

Tað vil framvegis verða heilsustarvsfólkið, sum hevur heilsufakligu ábyrgdina av koppsetingunum, og heilsustarvsfólkið ella hjálparfólkið hjá heilsustarvsfólkinum, sum skal koppseta.

Sambært autorisatiónslógini eru tað einans læknar, sum kunnu koppseta í Føroyum. Um so er, at onnur heilsustarvsfólk fáa møguleika at koppseta sambært autorisatiónslógini, verður mælt til, at apotek eisini fáa møguleika fyri at gera avtalu við og seta í starv hesi heilsustarvsfólk, til at fremja koppsetingar fevndar av koppsetingarlógini.

Heilsustarvsfólk sett í apoteksverkinum kunna brúka onnur starvsfólk í apoteksverkinum sum hjálparfólk, sambært vanligu ásetingunum um nýtslu av hjálparfólkum.

Sostatt skal heilsustarvsfólkið framvegis tryggja, at hjálparfólkið hevur fingið neyðuga vitan og leiðbeining í sambandi við koppsetingina.

Ætlanin við hesum tilmæli er ikki, at máa burtur av arbeiðsbýtinum millum læknar og apotekarar við atliti at, at tað ikki má vera sami persónur, sum ávísir heilivág og samstundis forvinnur sær pening við at selja heilivágin. Apotekarar fáa einans møguleika at bjóða avmarkaðum persónsbólkum, fevndir av koppsetingarlógini, koppsetingar.

Viðmerkjast skal, at sáttmálaøki hjá heilsustarvsfólki kann vera avmarkað til ávís setanarpláss. Til dømis kann nevnast, at sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ásetir, at sáttmálin fevnir um sjúkrarøktarfrøðingar o.o. settir í starv í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum, Heilsutrygd, Gigni, ellis- og røktarheimum o.ø. Um apoteksverkið skal kunna seta í starv sjúkrarøktarfrøðingar undir nevnda sáttmála, má sáttmálaøki eftir avtalu millum sáttmálapartarnar, víðkast til eisini at fevna um Apoteksverkið.

*Brot úr hoyringarsvarinum hjá Læknafelagnum Føroya til tilmæli og viðmerkingar hjá arbeiðsbólkinum til hoyringarsvarið*

Læknafelag Føroya vísir á, at: "Læknafelag Føroya er ikki samt við grundgevingunum fyri at apoteksverkið skal seta í starv starvsfólk, sum skulu hava ábyrgdina av at apoteksverkið kann taka sær av ókeypis koppsetingum móti ávísum smittandi sjúkum. Tað er rætt, at atkoma til koppsetingarstað hevur týdning fyri hvussu nógv, ið koppseta seg, men hetta er ikki ein trupulleiki í Føroyum, har 36 kommulæknaviðtalur spjaddar um alt landið í áratíggju hava staðið fyri koppsetingum av føroyingum. Hetta hevur virkað væl."

*Til hetta er at siga*, at tað ikki er rætt, at skipanin hevur virkað væl ella at atkoman til koppseting á kommunulæknaviðtalum er góð, hóast tær eru 36 viðtalur kring landið.

WHO hevur sett sum mál, at 75% í aldursbólkinum 65 ár og eldri verða koppsett. Føroyar liggja langt frá hesum máli. Sambært hagtølum frá Heilsutrygd, vóru umleið 55% koppsett fyri influensu í 2020/2021. Í hesum tølum eru eisini onnur í vandabólki og heilsustarvsfólk. Harafturat riggar skipanin við koppsetingum á ellis- og røkarheimum ikki eftir ætlan. Tað gongur ov long tíð, frá tí tann fyrsti læknin kemur á staðið at koppseta til tann seinasti hevur koppsett. Summir læknar vilja ikki fara á ellis- og røkarheim at koppseta, so um hesi búfólk ikki kunnu koma til kommunulæknaviðtaluna, tí tey eru so rørslutarna, verða tey ikki koppsett.

Kommunulæknaviðtalur hava sum meginreglu opið í dagtímunum, tá flestu fólk eru til arbeiðis. Tað kann vera trupult hjá starvsfólki at fáa frí til at fara í kommunulæknaviðtaluna at lata seg koppseta. Sambært Landsfelag Pensjónista er hetta ein trupulleiki, tí fleiri eldri hava tørv á at hava ein ella fleiri – ofta avvarðandi – at koma við sær til koppsetingina. Hesi mugu taka frí frá arbeiði. Sambært Landsfelag Pensjónista lata fleiri eldri vera við at lata seg koppseta, tí tey vilja ikki, at avvarðandi skulu missa arbeiðstíð ella løn. Hjá tímaløntum er hetta ein trupulleiki, tí tey missa løn, um tey í arbeiðstíð fara at lata seg koppseta. Fleiri tímalønt eru láglønt, og tí er hetta ein fíggjarligur missur fyri tey, um tey missa tímaløn.

Læknafelag Føroya vísir á, at: ”Í Danmark hava apotekini og nøkur vaccinationscentur í vetur yvirtikið árstíðarkoppsetingarnar , tvs móti Covid-19 og influenza og hagtølini benda ikki á betri dekning, men eru hinvegin nakað verri, bæði fyri Covid-19 og influenza.”

*Til hetta er at siga,* at tað er ikki rætt, dekningurin er verri. Víst verður til tíðindaskriv frá Sundhedsstyrelsen 17. januar 2024[10]: “Efterårets vaccinationsindsats har været en succes med en rigtig høj tilslutning til både covid-19 og influenzavaccination – særligt blandt de ældste og mest sårbare, som er i størst risiko for alvorlig sygdom og død.”

Tað er heldur ikki rætt, at apotekini og vaccinatiónssentur hava yvirtikið koppsetingarnar. Í nevnda tíðindaskrivi stendur, at “Vaccinationsindsatsen har igen i år været et tæt samarbejde mellem stat, regioner, kommuner og private aktører på bl.a. udvalgte apoteker landet over”.

Læknafelag Føroya vísir á, at: “Ein annar meira álvarsligur spurningur er, hvussu apotekini ætla at skipa tilbúgvingina í mun til anafylaksi, tvs um eitt fólk fær eina álvarsliga allergiska reaktión. Hetta krevur vanliga, at mann primert gevur adrenalin intramuskulert, ilt á masku, skipar fyri intravenøsari atgongd og gevur ymsan annan heilivág sekundert um neyðugt og innleggur á sjúkrahús beinanveg. Hetta er ein uppgáva sum royndir sjúkrarøktarfrøðingar og læknar útinna í einari akuttari støðu.”

*Til hetta er at siga,* at apotekini loystu hesa støðuna væl undir koppsetingini fyri COVID-19. Harumframt verður víst á, at hetta tilmæli gevur apoteksverkinum loyvi til at seta í starv lækna ella annað heilsustarvsfólk at koppseta fyri apoteksverkið, sum verður við til at tryggja eitt enn betri koppsetingartilboð á apotekunum.

**Mælt verður til at áseta eitt undantak til forboðið fyri, at apotekari kann vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni soleiðis, at apotek kunnu seta í starv lækna at koppseta fyri apoteksverkið. Um so er, at onnur heilsustarvsfólk fáa møguleika at koppseta sambært autorisatiónslógini, verður mælt til, at apotek eisini fáa møguleika fyri at seta í starv hesi heilsustarvsfólk.**

[10] https://www.sst.dk/da/nyheder/2024/Vaccinationsindsatsen-for-influenza-og-covid-19-er-slut-for-i-aar

## 2. Skipað verður fyri heilivági til borgarar, ið liggja til tað síðsta

Hin 3. apríl 2023, svaraði landsstýriskvinnan í heilsumálum í sambandi við ein § 52 a fyrispurning frá Magnu Elianu Mørkøre, løgtingskvinnu, at landsstýriskvinnan ætlar at endurskoða lóggávuna um apoteksverkið og heilivág og viðgera spurningin um at loyva røktarheimum o.ø. at liggja inni við heilivági til terminalan linna. Atlit verða í hesum sambandi tikin til viðmerkingarnar hjá viðkomandi pørtum.

Arbeiðsbólkurin hevur havt fund við Magnu og onnur umboð fyri kommunurnar, fyri at viðgera spurningin um heilivág á føroyskum ellis- og røktarheimum, umframt í heimatænastuni.

Umboðini fyri kommunurnar greiddi frá, at tað er ein avbjóðing, at ellis- og røktarheim og heimatænasturnar ikki sleppa at hava eina goymslu av heilivági liggjandi til at viðgera búfólk, ið liggja til tað síðsta. Upplivað hevur verið, at búfólk fær tørv á linnandi heilivági eitt fríggjakvøld og heilivágurin fyrst kemur fram á heimið týsdagin eftir. Avvarðandi hava eisini skula koyrt til Havnar eftir heilivágnum. Dýrabar tíð, ið heldur kann brúkast hjá búfólkinum, ið liggur til tað síðsta. Staðfestast kann ikki, hvussu stórur tørvurin í roynd og veru er, tí neyðugu hagtølini finnast ikki.

Umboðini fyri kommunurnar eftirspyrja, at ein læst goymsla av morfini og nøkrum fáum øðrum sløgum av heilivági liggur á heiminum – sum einans sjúkrarøktarfrøðingur hevur atgongd til. Tekur ein støða seg upp, har búfólkið fær tørv á heilivági, kann sjúkrarøktarfrøðingurin útflýggja búfólkinum heilivágin eftir at lækni hevur ávíst heilivágin til einstaka búfólkið.

Eitt umboð fyri kommunurnar metti, at øll røktarheim í Føroyum hava sjúkrarøktarfrøðing.

Landsapotekarin metir ikki, at hetta er rætta loysnin, vísandi til tað sum Landslæknin hevur ført fram um málið[11], sí meira um hetta niðanfyri.

Á fundinum varð semja um, at ein onnur loysn kundi verið, at starvsfólk á heimunum ringja til vaktina á apotekunum, og apoteksverkið so fyriskipar, at ein hýruvognur koyrir út til heimið við heilivágnum. Ein fortreyt fyri hesari loysn er, at ein røtt og skjót viðgerð fæst til vega. Landsapotekarin upplýsir, at vakt er á øllum apotekum í Føroyum, uttan á apotekinum í Runavík. Harumframt varð semja um, at lækni altíð skal ávísa heilivágin til einstaka sjúklingin, áðrenn sjúkrarøktarfrøðingur kann útflýggja búfólkinum heilivágin.

Arbeiðsbólkurin heldur at tað er týdningarmikið, at tá heilivágur verður nýttur, sum liður í linnandi røkt til borgarar, ið liggja til tað síðsta, má heilivágurin læknafakliga vera tillagaður einstaka borgaranum. Ein lækni má leypandi rætta farmakologiskar viðgerðir til borgaran. Rætti heilivágurin eigur at verða lætt atkomiligur við at røktarheim, búpláss o.o. hava ein fast knýttan kommunulækna. Starvsfólkini á røktarheimunum fáa á tann hátt lætta atgongd til ein lækna og heilivágurin kann ordinerast einstaka borgaranum.

Arbeiðsbólkurin mælir frá, at nýta tryggleikakassa grundað á, at í Danmark varð so líðandi steðgað við at nýta tryggleikakassan í september 2022. Framleiðslan av kassunum er nú hildin uppat. DMCG-PAL (Dansk Multidisciplinær Cancer Gruppe for Palliativ Indsats) hava meldað út, at tey ikki longur stuðla nýtsluni av kassunum, m.a. grundað á vantandi fakliga dygd í innihaldi og nýtslu av kassunum. Kassin var "bílagdur" til eldri borgarar, sum ein

[11] https://www.logting.fo/mal/mal/?id=10364

standardiserað og automatiserað fyriskipan, ið ikki tekur hædd fyri einstaka tørvinum hjá borgaranum, ið liggur til tað síðsta. Í Danmark eru fráboðaðar fleiri ótilætlaðar hendingar – eisini við deyðiligum fylgjum.

Arbeiðsbólkurin mælir harumframt frá, at hava heilivágin liggjandi í depotum á røktarheimum o.ø., tí váði er fyri, at hann gongur út ella verður nýttur ótilætlað, sum kann hava við sær ótilætlaðar hendingar.

**Mælt verður til, at fyriskipanir verða settar í verk soleiðis, at ein lækni leypandi rættar farmakologiskar viðgerðir til borgaran. Tá røktarheim ringja til apoteksvaktina, tí borgarin liggur til tað síðsta, verður heilivágurin borin røktarheimunum á skjótasta hátt, til dømis við hýruvogni, eftir at læknin hevur ávíst heilivágin.**

### 3. Einkarætturin hjá apoteksverkinum at innflyta o.a. heilivág og undantøk til einkarættin

Endamálið við einkarættinum hjá apoteksverkinum er millum annað, at heilivágsbrúkarar verða tryggjaðir heilivág av høgari dygd, trygd og virknað. Hetta ber til, tí krøv til dygd o.a. á heilivágnum verða sett í øllum liðum, frá framleiðslu til útflýgging. Apoteksflotin er eyðkendur av at tryggja rættan heilivág í rættari dygd, nøgd og styrki til rætta persón, í rætta skamt og indikatión og við rættari vitan til at tryggja ætlaða endamálið – at fyribyrgja og viðgera sjúku.

Tí er týdningarmikið, at haldgott grundarlag er fyri at gera undantøk til einkarættin, og at undantøkini ikki hava við sær, at heilivágurin verður handfarin á ein hátt, so hann missir dygd, virkna ella gerst ótryggur. Harumframt er týdningarmikið, at landsapotekarin kann hava eftirlit við heilivágnum á apotekunum og á teimum støðum, sum undantøkini fevna um.

Verandi reglur um einkarættin hjá apoteksverkinum at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, og undantøk til einkarættin, samsvara í summum førum ikki við nútíðararbeiðsgongdir og nútíðartørvin í samfelagnum. Tí er tørvur á at tillaga og nágreina reglur um einkarættin og undantøk til einkarættin hjá apoteksverkinum.

Einkarætturin er lógarfestur í § 29 í lógini:
“Bert apoteksverkið hevur loyvi til at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, um so er, at einki annað er ásett í hesi lóg ella av reglum ásettum við heimild í lógini.
2. stk. Ásetingin í stk. 1 er ikki galdandi fyri:
1) koppingarevni og serum frá Statens Seruminstitut, Statens veterinære Serumlaboratorium ella Statens veterinære Institut for virusforskning, sum sjúkrahús og læknar ávikavist djóralæknar flyta inn,
2) heilivág, sum ferðandi her til landið hava við sær til egna nýtslu.
3. stk. Landsstýrið kann áseta reglur um ta handfaring av heilivági, sum nevnd er í stk. 2.”

Galdandi § 29 er orðað sum eina tilvísingaráseting, ið vísir til aðrar reglur uttan fyri sjálva ásetingina – “[...]um so er, at einki annað er ásett í hesi lóg ella av reglum ásettum við heimild í lógini”. Ásetingin kann tykjast óítøkilig og ógreið fyri borgaran.

Mælt verður til, at nágreina hvørji undantaksføri, onnur enn apoteksverkið, kunnu handfara heilivág. Tilmæli um úttømandi undantaksførini eru lýst niðanfyri.

### 3.1. Einkarættur hjá apoteksverkinum at innflyta koppingarevni og serum

Eitt undantak til einkarættin hjá apoteksverkinum at innflyta o.a. heilivág er, at sjúkrahús, læknar og djóralæknar kunnu flyta inn koppingarevni og serum frá Statens Serum Institut. Undantakið er sett í lógina við lógarbroyting í 1991. Tað hevur ikki eydnast arbeiðsbólkinum at funnið fram til grundgevingina fyri lógarbroytingini. Grundgevingin er ikki at finna í skjalagoymsluni og framgongur ikki av tingviðgerðini. Fyrrverandi starvsfólk hjá apoteksverkinum kunnu heldur ikki greiða frá grundgevingini. Sostatt er ikki greitt, hví undantaksásetingin var sett í gildi.

Flest koppingarevni eru viðkvom og serstøk krøv eru til handfaring og goymsluviðurskifti. Hesar treytir eru eisini galdandi undir flutningi. Til dømis kann nevnast reglurnar um GDP (Good Distribution Practice), ið gera tað torført fyri einstaka læknan at bíleggja koppingarevni sjálvur. Hetta tí, at køliketan ikki skal brótast, koppingarevni skal sendast við kurérposti og hitamátingar skulu fremjast undir allari ferðini frá byrjan til endastøð. Tað hevur við sær, at kostnaðurin fyri eina sending liggur millum 5.000 kr. og 10.000 kr., hóast talan einans er um ein heilivágspakka ella smærri nøgdir av heilivági.

Tey seinastu 25 árini, hevur apoteksverkið innflutt koppingarevni frá Statens Serums Institut, serliga til barnakoppingarætlanina, men eisini til HPV og onnur koppingarevni. Út frá rakstrarbúskaparligum atlitum og fyri at varðveita tað álitið, sum heilivágsbrúkarar hava til góðskuna á heilivágnum teir taka, er tað meira skynsamt, um landið hevur eina felagsgoymslu á apoteksverkinum, sum tryggjar GDP.

Arbeiðsbólkurin er ikki kunnugur við, at sjúkrahús, læknar og djóralæknar innflyta heilivág uttanum apoteksverkið í dag.

Ásetingarnar um, at apoteksverkið hevur einkarætt at flyta inn heilivág, og landsapotekarin hevur eftirlit við hesum vørum tryggja, at góðskan á innflutta heilivágnum lýkur lógarásett krøv. Landsapotekarin kann ikki hava eftirlit við koppingarevni, sum sjúkrahús, læknar og djóralæknar flyta inn til Føroya. Mælt verður tí til, at apoteksverkið fær einkarætt at innflyta koppingarevni og serum við at strika undantaksásetingina í § 29, stk. 2, nr. 1.

**Mælt verður til, at apoteksverkið fær einkarætt at innflyta koppingarevni og serum til Føroya.**

### 3.2. Loyvi hjá heilsustarvsfólki at innflyta heilivág í sambandi við eina tilbúgving

Grundarlagið undir Svalbardbólkinum er norðurlendska heilsutilbúgvingaravtalan frá 2002. Føroyar er partur av samstarvinum og hevur bundið seg til, eftir umbøn, at veita øðrum norðurlondum tilbúgvingarhjálp, um møguleiki er fyri tí. Somuleiðis kann Føroyar biðja onnur norðurlond um at veita Føroyum tilbúgvingarhjálp, um møguleiki er fyri tí.
Harumframt, hava Føroyar bundið seg til at fremja samstarv og avtaka forðingar í lóg, forskriftum ella øðrum rættarreglum, ið kann forða fyri samstarvinum.

Tekur ein neyðstøða seg upp í Føroyum, undir hesum føroyskum sjóøki ella umborð á skipi við føroyskum flaggi, kann tørvur vera á, at útlendsk heilsustarvsfólk og onnur starvsfólk hava við sær heilivág til Føroya ella umborð á skipi. Einkarætturin hjá apoteksverkinum at innflyta og í aðramátar handfara heilivág hevur við sær, at heilsustarvsfólk og onnur starvsfólk ikki hava loyvi at innflyta heilivág til Føroya.

Mett verður, at einkarætturin í so máta er ein forðing fyri norðurlendska samstarvinum, ið Føroyar eiga at arbeiða fyri at avtaka. Sum ein liður í at avtaka forðingar fyri norðurlendska samstarvinum verður skotið upp, at heilsustarvsfólk og onnur starvsfólk, sum starvast í norðurlandi, sum Føroyar í sambandi við eina vanlukku ella neyðstøðu heita á um at veita hjálp sambært heilsutilbúgvingaravtaluni, kunnu í avmarkaðan mun hava við sær heilivág at nýta í tilbúgvingararbeiðnum. Heilsustarvsfólk og onnur starvsfólk kunnu hava heilivágin við sær, um heilivágurin er góðkendur í norðurlandinum, sum starvsfólkið starvast í, uttan mun til, um hann er góðkendur í Føroyum.

Landslæknin og Fólkaheilsustýrið taka undir við hesum tilmæli.

**Mælt verður til, at heilsustarvsfólk og onnur starvsfólk fáa loyvi at innflyta heilivág í sambandi við tilbúgvingararbeiði, um Føroyar heita á norðurland um at veita Føroyum tilbúgvingarhjálp.**

### 3.3. At nágreina, at reiðarar og skiparar hava loyvi at hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu umborð og í ávísum føri at keypa og innflyta heilivág, tá skipið leggur at í útlendskum havnum

Fleiri lond hava sett krav um, at skip, bjargingarbátar og bjargingarflakar hava eina medisinkistu umborð, ið lýkur treytirnar í International Convention for the Safety of Life at Sea (SOLAS), 1974, hjá ST. Medisinkistan verður nýtt í sambandi við skaða og bráðfeingissjúku í einari neyðstøðu til sjós. Sambært SOLAS-konventiónini skulu bjargingarbátar og bjargingarflakar hava Life-Saving Appliances Code (LSA-reglugerð). LSA-reglugerðin ásetir, at umborð á bjargingarbátum og bjargingarflakum skal vera útgerð til fyrstuhjálp í vatntættum ílati (medisinkistan), umframt heilivágur til at viðgera allar persónarnar, sum bjargingarbáturin ella bjargingarflakin er góðkendur til, fyri sjóverk í 48 tímar.

ES hevur eisini ásett reglur, Rådets direktiv 92/29/EØF af 31. marts 1992, um at skip skulu hava eina medisinkistu við heilivági og medisinskari útgerð umborð.

Í Føroyum eru reglurnar um medisinkistu í høvuðsheitum ásettar í § 17 í apotekara- og heilivágslógini og fráboðan frá Sjóvinnustýrinum nr. 2 frá 11. desember 2012, um medisinkistu og sjúkuviðgerð umborð á skipi. Sambært fráboðanini kann heilivágur í ávísum føri keypast frá útlendskum apoteki og innflytast til Føroya. Til dømis í sambandi við nýbygging av skipi ella umskráseting av skipi frá fremmandum flaggi til føroyskt flagg. Harumframt í sambandi við fylling av medisinkistum. Eisini kann skiparin ella sjúkraviðgerin í ávísum føri útflýggja heilivág umborð á skipi.

Tá føroysk skip leggja at í útlendskum havnum og heilivágur verður keyptur á apoteki og fluttur umborð á skipið, er hetta at skilja sum at innflyta heilivág til Føroya. Hetta kemst av, at heilivágur verður keyptur frá einum útlendskum landøki, t.e. apoteki, og fluttur á føroyskt øki, t.e. skipið. Við millum annað tí í huga at útgangsstøðið er, at bert apoteksverkið hevur loyvi at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág, verður mett, at ivasamt er um verandi § 17, stk. 2, litra a í apotekaralógini fevnir um, at reiðarar og skiparar kunnu flyta inn heilivág til Føroya ella bíleggja ella keypa heilivág frá øðrum enn føroyskum apotekum til nýtslu umborð á skipinum. Ivasamt er eisini um reiðarar og skiparar kunnu útflýggja heilivág umborð á egnum skipi. Viðmerkjast skal eisini, at § 17, stk. 2, litra a einans

fevnir um forskriftaskyldigan heilivág. Spurnartekin kann tí setast við, um reiðarar og skiparar kunnu útflýggja ikki-forskriftaskyldigan heilivág til nýtslu umborð á skipi.

Skotið verður upp, at skiparar og reiðarar fáa loyvi at hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu umborð og í ávísum føri at keypa og innflyta heilivág, tá skipið leggur at í útlendskum havnum. Við ávísum førum er at skilja støðurnar, nevndar í §§ 6, 7 og 14 í fráboðanini, tað er til dømis í sambandi við nýbygging av skipi ella umskráseting av skipi frá fremmandum flaggi til føroyskt flagg. Harumframt í sambandi við fylling av medisinkistum.

Lagt verður upp til at klára meginreglan verður, at heilivágur til medisinkistu á føroyskum skipum skal keypast í Føroyum. Við hesum eru fólk umborð á skipum tryggjaði somu heilivágsgóðsku sum fólk á landi í Føroyum. Skipari ella reiðari á føroyskum skipi, ið liggur í útlendskum havnum, kann tó gera av at keypa heilivág ella medisinkistu í viðkomandi landi, um tað verður mett neyðugt. Loyvið er treytað av, at heilivágurin ella medisinkistan verður keypt og handfarin í samsvari við lógir og reglur í viðkomandi útlandi. Hetta hevur við sær, at útlendski heilivágsseljari hevur og kann skjalprógva søluloyvi.

**Mælt verður til, at skiparar og reiðarar fáa loyvi at hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu umborð og í ávísum føri at keypa og innflyta heilivág, tá skipið leggur at í útlendskum havnum.**

### 3.4. Sjúkrahús og líknandi viðgerðandi stovnar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í viðgerðini

Í grein 20 í verandi lóg stendur, at landsstýrið kann áseta reglur um og taka avgerð um, hvussu sjúkrahús og aðrir líkir stovnar skulu keypa, goyma og annars handfara heilivági.

Í viðmerkingunum til greinina stendur, at: ”[Greinin] Er um heilivág á sjúkrahúsum og tilíkum stovnum. Apotekini hava eftirlit við goymslunum á hesum stovnum sum tænastuveiting umleið eina ferð um árið. I tann mun tørvur er á, eigur landsstýrið at fáa heimild at áseta reglur hesum viðvíkjandi, og verður hetta at gera í samstarvi við avvarðandi stovn og tað apotekið, sum letur heilivágin til stovnin. Reglurnar eiga at samsvara reglunum í Norðurlondum. Heilivágurin skal keypast á føroyskum apoteki.”

Greitt er ikki, hvørjir aðrir líkir stovnar eru fevndir av ásetingini. Sjúkrahús er eitt serligt slag av stovni og kann hetta tala fyri, at greinin hevur eitt avmarkað nýtsluøki.

Landslæknin mælir til, at rúsevnisviðgerðarstovnar fáa møguleika at hava einstøk heilivágssløg liggjandi á goymslu, til at nýta í byrjanini av einari viðgerð av sjúklingi.

Landslæknin ætlar, at heilivágurin verður ávístur sjúklinginum, eftir at læknin hevur kannað sjúklingin. Tá læknin hevur kannað sjúklingin, kann sjúklingurin fáa heilivágin, ið liggur á goymslu, og tørvur er sostatt ikki á, at skula á apotek eftir heilivágnum fyrst. Atgongd til felags heilivág er neyðug í førum, tá ein viðgerð við heilivági verður gjørd á staðnum, tá viðgerðin er treytað av heilivágnum, og tá tað ikki er ráðiligt, at sjúklingurin sjálvur fer eftir heilivágnum á apoteki.

Landslæknin upplýsir, at tøvur í høvuðsheitum er á heilivági við innihaldsevninum chlordiazepoxid, sosum Klopoxid (Risolid) ella øðrum heilivági, sum hevur sama endamál sum

Risolid. Risolid hevur ikki við sær ein stóran váða fyri misnýtslu. Virknaðurin av Risolid er doyvandi og heilivágsbrúkari fær ikki spenningskenslu av heilivágnum.

Blákrossheimið upplýsir, at endamálið við at hava heilivágin á goymslu er, at gera innskrivingina á Blákrossheiminum so smidliga sum gjørligt. Tað vil siga, at brúkarin fær avrúsingarheilivágin, tá ið brúkarin hevur tørv á honum, og ikki má bíða. Sum støðan er í løtuni, má sjúkrarøktarfrøðingurin, eftir innskrivingina av borgara, fara á apotekið eftir heilivágnum. Hetta tekur vanliga umleið 30-40 min. Hetta skal gerast hvørja ferð ein nýggjur brúkari skal skrivast inn. Hetta kann vera 2-4 ferðir um vikuna. Eisini kann tað koma fyri, orsakað av onkrum mistaki, at heilivágurin ikki er ordineraður sum ætlað; ið hevur við sær ein eyka túr á apotekið. Alt hetta er við til, at borgarin ikki fær neyðugan heilivág, tá tørvur er á tí.

Blákrossheimið upplýsir, at um tey høvdu Risolid íløt á goymslu, hevði hetta spart teimum tíð til apoteksvitjanir, tí so høvdu tey kunna keypt tey størru íløtini, sum so eisini hevði havt við sær at tey góvust at burturbeina óbrúktan heilivág. Síðani broytingin kom, um at Blákrossheimið ikki kann hava Risolid á goymslu, hava tey burturbeint áleið 350 tbl. Hetta kemst av, at borgarar ikki altíð brúka allan heilivágin, sum er ordineraður teimum.

Eitt ílat við 24 tbl. av Risolid 25 mg kostar pr. 18 des: 82,25 kr. 100 tbl: 245,10 kr.
Eitt ílat við 24 tbl. av Risolid 10 mg kostar pr. 18 des: 107,60 kr 100 tbl: 213,05 kr.

Blákrossheimið hevur umleið 100 innskrivningar á Blákrossheiminum um árið.
Tað svarar til eina útreiðslu uppá:

- 8.200 kr. fyri Risolid, 24 stk. á 25 mg.
- 10.700 kr. fyri Risolid, 24 stk. á 10 mg

Blákrossheimið upplýsir, at tað at hava heilivágin í goymslu á Blákrossheiminum, viðførur at borgarin fær neyðuga heilivágin, sum viðkomandi hevur tørv á, til røttu tíð. Eisini ger tað, at sjúkrarøktarfrøðingurin alla tíðina er tilstaðar, tá ið brúkarin er innskrivaður. Tað er sera umráðandi, at sjúkrarøktarfrøðingurin er tilstaðar á Blákossheiminum, tí borgarin er ofta illa fyri, og tørvur er á at observera tætt. Nýggju lógarkrøvini eru soleiðis, at borgarin skal abstinensskorast 1 ferð um tíman fyrstu 3 tímarnar eftir innskriving. Hettar ger tað trupult hjá sjúkrarøktarfrøðinginum at fara av Blákrossheiminum.

Mælt verður til at nágreinað verður, at líknandi viðgerðandi stovnar eru at skilja sum stovnar, ið hava sum sítt høvuðsendamál at viðgera sjúklingar. Hevur stovnurin seingjarpláss talar hetta fyri, at hann er fevndur av ásetingini. Ætlanin er ikki at gera broytingar í heimildini hjá sjúkrahúsum, at hava á goymslu, keypa og annars handfara heilivág. Ásetingin fevnir til dømis um rúsevnisviðgerðarstovnarnar. Ásetingin fevnir ikki um ellis- og røktarheim o.l. tí hesi ikki hava sum sítt høvuðsendamál at viðgera sjúklingar. Heimildin hjá sjúkrahúsum og líknandi viðgerðandi stovnum at útflýggja og goyma heilivág er treytað av, at lækni hevur ordinerað heilivágin.

**Mælt verður til, at sjúkrahús og líknandi viðgerðandi stovnar, til dømis rúsevnisviðgerðarstovnar, kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í viðgerðini.**

### 3.5. At nágreina at læknar, djóralæknar og tannlæknar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í teirra starvi. Eftirlit skal havast við hesum

*At nágreina at læknar, djóralæknar og tannlæknar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í teirra starvi*

Rætturin hjá læknum at nýta heilivág í sambandi við viðgerð av sjúklingum er festur í autorisatiónslógina.

Ásett er í § 9 í forskriftakunngerðini[12], útskrivað við heimild í apotekara- og heilivágslógini, at læknar og tannlæknar kunnu, sum liður í teirra virksemi, ávísa heilivág til nýtslu hjá ávísum heilivágsbrúkara ella til nýtslu í praksis.

Mælt verður til, at nágreina at læknar, djóralæknar og tannlæknar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í teirra starvi. Nágreinað verður, at lækni bert kann hava eitt heilivágsskáp, um so er at læknin hevur egna viðtalu ella starvast sum avloysari í viðtalu og sjúklingar eru tilknýttir viðtaluni. Omanfyrinevndu starvsfólk kunnu keypa heilivág frá apoteksverkinum og hava á goymslu og útflýggja heilivág í sambandi við sjúklingaviðgerð.

*Eftirlit skal havast við handfaringini av heilivágnum hjá læknum, djóralæknum og tannlæknum*

Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við støði á kommunalum viðtaluhølum, tólum, innbúgv og amboðum, sambært § 7, stk. 3 samanber við § 7, stk. 2 í Løgtingslóg nr. 28 frá 23. apríl 1999 um kommunulæknaskipan.

Í viðmerkingunum til ásetingina stendur, at: "Landsstýrismaðurin ella tey sum landsstýrismaðurin gevur heimild til hetta, hava eftirlit við, at hølini eru í tí standi, sum ásett er í reglunum, og at tað/tey innbúgv, tól og amboð, sum ásett er í reglunum, eru í viðtaluhølunum."

Landsstýrismaðurin hevur delegerað omanfyrinevndu eftirlitsheimildir til Heilsutrygd[13].

Ásett er í skjali 1 í kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum[14], útskrivað við heimild í lóg um kommunulæknaskipan, at kommunan útger læknaviðtaluhølið við innbúgv sum millum annað:

"Eitt køliskáp til køkin.
Eitt køliskáp til hvønn kommunulækna til vaksinatiónsgoymslu."

Frá 1. mars at rokna eru 37 kommunulæknaviðtalur í Føroyum. Harafturat er ein privatur serlækni, sum fær ískoyti úr Heilsutrygd og ein privat viðgerðarstova við serlæknum og øðrum. Kommunu- og serlæknaviðtalur hava vanliga heilivág á goymslu, sum er á sama lista sum danskar regiónir nýta, umframt koppingarevni, fevnt av almenna koppsetingartilboðnum.

Arbeiðsbólkurin heldur tað er týdningarmikið, at koppingarevni verður goymt við teimum hitastigum o.s.fr., sum stendur á pakninginum, soleiðis at koppingarevni ikki missur sín virkna.

---

[12] Kunngerð nr. 124 frá 7. september 2022 um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtlutan av heilivági.
[13] "Stovnurin rindar eisini fyri umsitingarútreiðslur, ið standast av vaktarskipanini, og hevur eftirlit við viðtaluhølunum vegna landsstýrismannin." Sí frágreiðing um Kommunulæknaskipanina, landsgrannskoðanin, februar 2023, síðu 18 - https://lg.fo/upload/tinymce/d03b6aafb61a97170280bc36bf1237a6fab84dad.pdf
[14] Kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004

Arbeiðsbólkinum kunnugt, hevur ongin Heilsutrygd ikki havt eftirlit við heilivágsskápum í kommunulæknaviðtalum og spurnartekin kann setast við, um Heilsutrygd hevur fakligu førleikarnar til at hava eftirlit við hesum. Óvist er tí, um heilivágurin verður goymdur forsvarliga.

Mælt verður til, at nágreina at eftirlit skal havast við heilivági í kommunu- og serlæknaviðtalum, hjá djóralæknum og tannlæknum. Mælt verður til, at arbeitt verður víðari við at kanna, hvør myndugleiki mest skynsamast kann hava hetta eftirlitið um hendi. Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt tveir myndugleikar, sum møguliga kunnu hava hetta eftirlitið um hendi, tað er landslæknin og landsapotekarin.

Landslæknin hevur vegna Styrelsen for Patientsikkerhed eftirlit við tí heilsufakliga virksemi, ið løggild heilsustarvsfólk útinna í Føroyum. Hetta eftirlitið er ikki nærri nágreinað í § 17 í tilsynsbekendtgørelsen[15]: “Landslægen fører det overordnede tilsyn med sundhedsforholdene og den sundhedsfaglige virksomhed på sundhedsområdet, jf. sundhedslovens § 213, stk. 1.”. Neyðugt er millum annað at kanna, um eftirlitið hjá landslæknanum fevnir um heilivágsgoymslur í kommunu- og serlæknaviðtalum.

Treytað av, at landslæknin ikki hevur skyldu at fremja eftirlitið sambært sundhedslógini, verða fíggjarliga avleiðingar av, at seta hetta eftirlitið í verk. Avbjóðandi er, at koma fram á ítøkiliga kostnaðin av hesum eftirliti. Eftirlitið inniber, at ein farmaseutur ella ein kliniskur farmakonomur fer til allar kommunulæknaviðtalurnar í landinum at fremja eftirlitið og ger frágreiðing um úrslitið av eftirlitinum. At fremja eftirlitið tekur umleið ein hálvan dag fyri hvørja viðtalu. Landsapotekarin mælir til, at eftirlit verður framt eina ferð um árið. Landsapotekarin heldur, at ein varislig meting er, at eitt hálvt starvsfólk má setast av til arbeiðið at fremja eftirlit. Støða má takast til, um eftirlitsmyndugleikin, kommunulæknin ella kommunurnar skulu rinda fyri eftirlitið.

Avleiddar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar verða eisini av eftirlitinum. Køliskáp, sum lúka treytirnar til at goyma heilivág, kosta umleið 15.000 kr. Haraftrat kostar árligi raksturin av køliskápinum, tað er yvirvaking av køliskapstemperaturinum, umleið 2.000 kr. um árið. Landsapotekarin metir, at ongin kommunulæknaviðtala í dag hevur yvirvaking av køliskápstemperaturi, og at meginparturin av viðtalunum mugu gera íløgu í nýtt køliskáp, sum er egnað til endamálið. Sambært verandi lóg skal kommunan útgera læknaviðtaluhølið við einum køliskápið, sum er egnað til at goyma koppingarevni í. Arbeiðsbólkurin hevur ikki mett um, hvørjar avleiðingar eftirlitið fær fyri djóralæknar og tannlæknar.

**Mælt verður til at nágreinað verður, at læknar, djóralæknar og tannlæknar kunnu hava á goymslu og útflýggja heilivág til nýtslu í teirra starvi. Eftirlit skal havast við handfaringini av heilivágnum hjá nevndu starvsfólkum.**

### 3.6. Loyvið hjá Kriminalforsorgini í Føroyum at handfara heilivág, sum verður nýttur í sambandi við viðgerð av fongslaðum persónum

Endamálið er millum annað, í ávísan mun, at geva Kriminalforsorgini møguleika at hava medisinskáp ella rúm, sum heilsustarvsfólk kunnu avgreiða heilivág, sum lækni hevur ordinerað einstaka fanganum.

[15] Bekendtgørelse nr. 922 af 16. juni 2022 for Færøerne om registrering af, underretning om og tilsyn med offentlige og private behandlingssteder m.v., sum broytt við bekendtgørelse nr. 1405 frá 12. oktober 2022

Arbeiðsbólkurin hevur verið í óformellum práti við Kriminalforsorgina um hetta. Víst verður á, at arbeiðsbólkurin skal viðgera málið við Justitsministeriet, sum er myndugleiki á økinum. Arbeiðsbólkurin hevur sent Justitsministeriet fyrispurningar, men hevur ikki hoyrt aftur frá teimum.

Landslæknin hevur eftirlit við heilsustarvsfólki, sum viðgera sjúklingar á stovnum undir Kriminalforsorgini, um so er at heilsufakligt virksemi fer fram í til dømis varðhaldinum í Mjørkadali. Landslæknin hevur ikki verið á eftirlitsvitjan á hesum stovni enn.

**Mælt verður til, at arbeitt verður víðari við at viðgera hvussu heilivágur, sum verður nýttur í sambandi við viðgerð av fongslaðum persónum, skal handfarast í Kriminalforsorgini í Føroyum.**

### 3.7. At nágreina loyvið hjá útbúgvingarstovnum og sveisaravirkum at bíleggja heilivág til nýtslu í teirra yrki. Harumframt at nágreina loyvið hjá fiskaheilsulívfrøðingum at ávísa heilivág til nýtslu í alivinnuni

Í verandi apotekara- og heilivágslóg stendur, at landsstýrið kann gera reglur um tá ljósmøður, heimasjúkrarøktarfrøðingar og tannrøktarar biðja um heilivág, sum forskrift krevst til, til nýtslu í yrki teirra. Í apotekara- og heilivágslóg stendur onki um heimildir hjá leiðarum á sveisaravirkjum,undirvísarum á Fróðskaparsetri Føroya og fiskaheilsulívfrøðingum.

Í §§ 33, 78 og 79 í forskriftakunngerðini[16] stendur, at:

“§ 33. Fiskiheilsulívfrøðingar kunnu ávísa heilivág til nýtslu í alivinnuni í samsvari við reglurnar í hesum kapitli.”

“Leiðarar á virkjum, ið hava sveisiarbeiði um hendi, kunnu bíleggja cinkain eygnasalvu 0,5% í einnýtsluíløtum.

Loyvt er undirvísarum á Fróðskaparsetri Føroya og útbúgvingarstovnum, ið eru góðkendir av Sjóvinnustýrinum og undirvísa innan sjúkuviðgerð, umsiting og handfaring av heilivági og medisinskari útgerð, sbr. fráboðan frá Sjóvinnustýrinum nr. 2 frá 11. desember 2012 um medisinkistu og sjúkuviðgerð umborð á skipi, at bíleggja upploysing til innspræning við natriumchlorid 9 mg/ml. Loyvt er undirvísarum á Fróðskaparsetrinum at bíleggja upploysing til innspræningar við adrenalin 1 mg/ml í ampullum á 1 ml.”

Fiskaheilsulívfrøðingar hava eina avmarkaða heimild at ávísa heilivág sambært § 6, samanber við § 2, í Løgtingslóg nr. 40 frá 23. apríl 1999 um djóralæknavirksemi v.m. Rætturin fevnir um at ávísa heilivág til nýtslu í alivinnuni.

**Mælt verður til at nágreina verður, at leiðarar á sveisaravirkjum og undirvísarar á Fróðskaparsetri Føroya kunnu bíleggja heilivág. Harumframt at fiskaheilsulívfrøðingar kunnu ávísa heilivág til nýtslu í alivinnuni.**

## 4. At dagføra heilivágshugtakið

[16] kunngerð nr. 124 frá 7. september 2022 um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtlutan av heilivági

Sum støðan er í dag, kann spurnartekin setast við, um apotekaralógin verður umsitin rætt við atliti at, hvørjar vørur eru fevndar av lógini.

Heilivágshugtakið í Føroyum er frá tí at lógin kom í gildi í 1989. Heilivágshugtakið í ES er nágreinað í sambandi við lógarbroyting frá 2004, við atliti at vísindaligu og teknisku menningini.

Í "Álit um Apoteksverkið í framtíðini" frá 2006 stendur:
"Neyðugt er at kanna heilivágslóggávuna í londunum kring okkum við atliti at dagføring av føroysku heilivágslóggávuni. Serliga við denti á greiðum allýsingum av heilivági og øðrum týdningarmiklum hugtøkum innan heilivágsøkið."

Tá landsapotekarin metir um ein vøra er fevnd av apotekaralógini, tekur hann útgangsstøði í, um Lægemiddelstyrelsen og ES rokna vøruna sum heilivág. Landsapotekarin tekur eisini støði í øðrum útlendskum heilivágsskráum, um heilivágurin ikki er skrásettur í Danmark ella ES. Av tí, at heilivágshugtakið ikki er broytt í Føroyum síðan 1989, eigur útgangsstøðið at vera tikið í føroysku lógini. Hetta hevur við sær eina stóra umsitingarliga byrðu, tí ein løgfrøðilig og heilsufaklig meting má gerast í hvørjum einstøkum føri, tá ein vøra kemur til landið, og tá ivi kann vera um, um vøran er heilivágur ella ikki – til dømis, tá ein borgari bíleggur eina vøru av netinum til Føroya.

Niðanfyri er ein lýsing av verandi heilivágshugtaki og tilmæli um nýtt heilivágshugtak.

*Verandi lóg*
Hugtakið heilivágur er í galdandi lóg allýst sum vøra, sum ætlað er til at geva fólki ella djórum til at fyribyrgja, gera av, linna, viðgera ella grøða sjúku, sjúkueyðkenni og pínu, ella til at ávirka likamsvirki.

Fyrimyndin til allýsingina er donsk lóggávu, nevniliga "Lovbekendtgørelse nr. 451/1982 om lægemidler". Allýsingin byggir á eitt álit um heilivág, ið ein apotekaranevnd, sett av Indenrigsministeriet, lat úr hondum í 1972, betænkning nr. 663.

Í álitinum hjá apotekaranevndini er skrivað, at endamálið við einari vøru ella einum evni er avgerandi fyri, um vøran kemur undir heilivágsøkið, tí hon skal vera ætlað til at fyribyrgja, linna, viðgera ella grøða sjúku o.a. Útgangsstøði verður tikið í, hvat framleiðarin metir endamálið við vøruni er. Harumframt verður eisini hugt at, hvussu vøran er sett saman, t.e. formur og skap. Í serligum føri verður hugt at virkisøki hjá vøruni.

Apotekaranevndin var samd um, at endamálið við vøruni má vera eitt høvuðsatlit at hava við í metingina um ein vøra kemur undir heilivágslógina. Avgerandi er ikki, um vøran í roynd og veru fyribyrgir, grøðir o.a., eina sjúku ella sjúkueyðkenni.

Landsstýriskvinnan kann lata lógina heilt ella lutvíst fevna um vørur, t.d. medisinska útgerð, matvørur ella fóður, sum ikki beinleiðis koma undir økið heilivágur, og kann taka undan lógini ávísar vørur ella vørubólkar. Apotekaranevndin ásannaði, at ein fyrisitingarlig atgongd at draga ávísa vøru inn undir lógina, kann verða eitt skot fyri bógvin við atliti at rættartrygdini. Ein treyt fyri at draga vøru inn undir lógina er tí, at týðandi heilsufaklig atlit tala fyri hesum. Lógin fevnir eisini um gitnaðarforðandi miðal.

Ein atfinning, ið kann gerast móti verandi lóg er, at lógin ikki viðger innanhýsis samanspælið millum lógina og løgtingslóg nr. 61 frá 10. juni 2008 um tiltøk at minka um royking.

Landsapotekarin metir, at nikotin hevur ein farmakologiskan virkna á nervalagið og er tí at meta sum heilivágur. Í útgangsstøðinum merkir hetta, at vørur við nikotininnihaldi eru fevndar av heilivágslógini.

Í roykilógini er tubbaksvøra lýst sum ein vøra, ið inniheldur evni úr tubbaksplantuni, eisini genetiskt umskapað tubbak, og sum er ætlað at roykja, tyggja, snúsa ella súgva, tó ikki apoteksvøra við nikotininnihaldi, um vøran er ætlað at hjálpa fólki at leggja av at roykja.

Apotekara- og heilivágslógin eigur at nágreina virkisøki hjá lógini við atliti at tubbaksvøru, fevnd av roykilógini.

*Tilmæli*
Mælt verður til, at heilivágshugtakið fer at innihalda tvær sjálvstøðugar – men ikki strangliga sundurskiltar – allýsingar. Tann eina allýsingin tekur útgangsstøði í vørulýsingini og hin í virkisøki hjá vøruni. Ein vøra verður at rokna sum heilivágur, tá hon er fevnd av einari av allýsingunum.

Nágreinað verður, at vøran kann vera at rokna sum heilivágur um 1) virkisøkið hjá vøruni er egnað at ávirka, hvussu kroppurin virkar fysiologiskt, ella 2) um lýst verður við, at vøran er egnað til at viðgera ella fyribyrgja sjúku.

Eftir fyrstu allýsingini er heilivágur at skilja sum vøra, ið kann nýtast ella gevast menniskjum ella djórum við tí endamáli at ávirka, broyta ella fáa í rættlag aftur fysiologiskt virksemi (funktion) við einum farmakologiskum, immunologiskum ella metabolskum virkna.

Við farmakologiskum virkna er at skilja, at virknaðurin hjá yrkisgøgnum og kyknum hjá fólki ella djóri verður ávirkaður. Við immunologiskum virkna er at skilja, at virknaðurin hjá immunverjuni hjá fólki ella djóri verður ávirkaður. Við metabolskum virkna er at skilja, at virknaðurin hjá stoffskiftinum hjá fólki ella djóri verður ávirkaður. Vøra sum inniheldur ein av hesum virknaðunum, og sum verður nýtt ella givin fólkum ella djórum við tí endamáli at ávirka, broyta ella fáa í rættlag aftur fysiologiskt virksemi, eru fevndar av fyrstu allýsingini, uttan mun til hvussu tær vera lýstar.

Dømi um vørur, ið eru heilivágar, eru náttúruheilivágur, homøopatiskur heilivágur heilivágur sum genterapi, radioaktivur heilivágur, pínustillandi heilivágur og vanligur heilivágur, bæði heilivágur í handkeypi og forskriftaskyldigur heilivágur.

Dømi um vørur, ið ikki eru heilivágar, eru kostískoyti, djórafóður, medisinsk útgerð, kosmetikkur, t.e. vakurleikarøkt, og líveitur, t.e. biosider,

Við uppskotinum, eru nakrar vørur ella vørubólkar undantikin virkisøki í lógini, tí tey eru fevnd av øðrum lógum. Sum dømi kann nevnast medisinsk útgerð.

Mælt verður til, at støða verður tikin til, hvørjar vørur, sum eru fevndar av roykilógini, skulu verða undantiknar virkisøki hjá apotekara- og heilivágslógini. Hetta kann vera gjørt við sum meginregla at áseta, at heilivágslógin ikki fevnir um vørur, sum eru fevndar av roykilógini. Er

eitt politiskt ynski um, at ávís vøra ella ávísar vørur, fevndar av roykilógini, heldur skulu vera fevndar av heilivágslógini, kunnu undantøk gerast til meginregluna.

Eftir næstu allýsingini er vøra at rokna sum heilivágur, um lýst verður við at vøran er egnað til at viðgera ella fyribyrgja sjúku. Hendan allýsingin fevnir um vørur við veruligum terapeutiskum ella medisinskum virkna eins og vørur uttan nakran virkna, um brúkarin av røttum kann vænta sær ein virkna við støði í lýsingini. Hetta hevur við sær, at heilivágshugtakið ikki einans fevnir um vandamiklar ella eitrandi heilivágar, men eisini um óvirknar og vandaleysar vørur, tá hesar verða lýstar sum heilivágar.

Lýsing kann fara fram við frámerking, sýning, tilmæli ella øðrum virksemi – til dømis á pakkitilfari, vørulýsing, ella við umrøðu á heimasíðu – ið kann geva vanliga brúkaranum ta fatan, at viðkomandi vøra er hóskandi at nýta í sambandi við, at viðgera ella fyribyrgja sjúku.

Ein trumfregla verður sett í lógina, ið inniber, at landsapotekarin fær heimild at gera av, at ávís vøra einans kemur undir heilivágslógina, hóast hon eisini er fevnd av aðrari lóggávu. Endamálið við trumfregluni er ikki at víðka um heilivágshugtakið, men at fáa greiðu á, eftir hvørjari lóg, ein vøra skal regulerast, tá hon bæði er fevnd av heilivágslógini og av aðrari lóggávu. Ásetingin má metast at vera nýtt í teimum lutfalsliga rárum førum, tá ein vøra kann vera allýst sum heilivágur og sum eitt annað slag av vøru – til dømis kostískoyti ella kosmetiskar vørur. Harumframt er endamálið at borgarin fær best møguligu verjuna og kunningina. Í sambandi við umsitingina av regluni verður lagt upp til, at landsapotekarin tekur fakfólk frá øðrum viðkomandi myndugleikum við uppá ráð, tá hetta verður mett neyðugt. Viðmerkjast skal, at siðvenjan hjá ES dómstólinum er, at heilivágslóg kemur framum aðra lóggávu, sum liggur tætt at heilivágslógini. Landsstýriskvinnan í heilsumálum kann, í samráð við viðkomandi ráðharra ella ráðfrúu, áseta nærri reglur um tílíkar vørur ella vørubólkar.

Allýst verður eisini “aktivt stof”, “mellemprodukt” og “hjælpestof”.

**Mælt verður til at broyta heilivágshugtakið soleiðis, at heilivágshugtakið inniheldur tvær sjálvstøðugar allýsingar. Tann eina allýsingin tekur útgangsstøði í vørulýsingini og hin í virkisøki hjá vøruni. Hetta ger, at hugtakið líkist tí, sum verður brúkt í Danmark og ES, og útgangsstøðið kann verða tikið í, hvussu vøran verður umsitin í Danmark og ES.**

## 5. At strika hugtakið “farmaseutiskur sertilbúningur”

Ein farmaseutiskur sertilbúningur er heilivágur, sum er ætlaður at reka handil við og útflýggja til nýtaran í upprunapakking framleiðarans, undir tí navni framleiðarin hevur kosið.

Grundgevingin fyri, at valt hevur verið at áseta nakrar reglur fyri heilivág og nakrar aðrar reglur fyri farmaseutiskar sertilbúningar er, at danska heilivágslógin hevur verið nýtt sum fyrimynd.

Danska heilivágslógin hevði ymiskar reglur fyri ávikavist (góðkenning av) heilivágar og farmaseutiskar sertilbúningar. Í 2005 verður farmaseutiskir sertilbúningar strikað úr donsku lógini[17] við fylgjandi grundgeving:
“Begrebet »farmaceutisk specialitet« udgår af loven, idet det ikke er indeholdt i lægemiddeldirektiverne. Gældende lægemiddellov indeholder i kapitel 4 særskilte regler for såkaldte farmaceutiske specialiteter defineret som »lægemidler, der er bestemt til at forhandles og udleveres til forbrugeren i fremstillerens originale pakning under et af fremstilleren valgt

[17] LFF 2005-10-05 nr. 7

navn«. Med lovforslagets vedtagelse vil kravene om godkendelse mv. som udgangspunkt gælde for alle lægemidler"

Reglurnar fyri farmaseutiskar sertilbúningar eru linari enn reglurnar fyri heilivág í Føroyum. Ásett er, at ikki er loyvt at flyta inn, reka handil við ella flýggja út farmaseutiskan sertilbúning uttan so, hann er upptikin í ta sertilbúningarskrá, ið skrásetingarráðið heldur. Við atliti til heilivág, er ikki loyvt at at framleiða, flyta inn, flýggja út, hava á goymslu, handla við og pakka heilivág. Tað ber sostatt væl til at framleiða, hava á goymslu og pakka farmaseutiskar tilbúningar, uttan hann er upptikin í sertilbúningarskránni.

Av tí, at føroyska apoteksverkið er alment og hevur einkarætt at flyta inn og handla við bæði heilivágar og farmaseutiskar tilbúningar og av tí, at ES og Danmark ikki longur nýta hugtakið "farmaseutiskur tilbúningur", er ikki neyðugt at hava ymiskar reglur fyri hesum í Føroyum. Verða hugtøkini strikað, er hetta við til at gera reglurnar í apotekaralógini einfaldari og meira tíðarhóskandi.

**Mælt verður til, at hugtakið "farmaseutiskur sertilbúningur" og hugtakið "sertilbúningarskráin" o.a. í kapitlinum um farmaseutiskar sertilbúningar, verður strikað úr lógini, soleiðis at heilivágshugtakið er einasta hugtakið um heilivág í lógini.**

### 6. At dagføra kapittulin um lýsingar um heilivág

Sambært verandi lóg er í útgangsstøðinum forboðið at lýsa við heilivági. Endamálið við hesum er at forða fyri óneyðugari ella ovurhonds nýtslu av heilivági.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað í útgangsstøðinum framvegis eigur at vera forboðið at lýsa við heilivági. Mett verður, at forboðið fyri at lýsa við heilivági hevur ein tálmandi virknað á heilivágsnýtsluna og tí er týdningarmikið at halda fast við forboðið.

Í høvuðsheitum kunnu tríggjar atfinningar vera gjørdar móti verandi kapitli um lýsingar:

3) Forboðið at lýsa við heilivági sambært § 44 fevnir ikki um talgildar lýsingar. Forboðið er galdandi fyri lýsingar í filmi, í útvarpi og sjónvarpi, úti á skeltum, uppsløgum, ljóslýsingum o.ø.t., í flutningsførum og í almennum hølum, uttan apotekshølum. Grundgevingin fyri at talgildar lýsingar ikki eru bannaðar er, at talgildi heimurin er broyttur nógv frá 1989 og fram til í dag. Lógin eigur eisini at endurspegla hesa broyting. Tað eru ikki haldgóðar orsøkir fyri at loyva lýsingum á internetinum og samstundis at banna lýsingum í sjónvarpi ella útvarpi. Landsapotekarin kann upplýsa, at borgarar tíðum venda sær til hansara og kunna um, at lýst verður við heilivági á sosialu miðlunum.

2) Landsstýrið skal góðkenna lýsingar sambært § 46: "Lýsing, sum ikki kemur undir forboðið eftir § 44 ella av reglum í § 47, er bert loyvd, tá ið slagið av lýsing, uppseting og innihald er góðkend av landsstýrinum". Í Danmark var hendan ásetingin strikað við lóg nr. 108 frá 25. november 1992, tí Justitsministeriet førdi fram, at stjórnarrættarlig ivamál vóru við ásetingini. Harumframt kann sigast, at landsstýrið ikki hevur heilsufakligar førleikar til at kunna meta um í hvørjum førum ein umbøn um at lýsa við heilivági skal góðkennast ella sýtast. Av hesum orsøkum verður mælt til at strika ásetingina.

3) Hugtøkini “lýsing”, “almenningur” og “heilsustarvsfólk” o.a. eiga at verða dagførd soleiðis, at tey eru í samsvari við ES heilivágsdirektiv o.a. Hetta eigur at gera umsitingina av lógini lættari, tí hyggjast kann til onnur lond við atliti at, hvussu lýsingar um heilivág verða umsitnar har, undir hesum hvat er fevnt av lýsingarhugtakinum.

Í verandi lóg eru heilsustarvsfólk at skilja sum farmaseutar, læknar, tannlæknar, djóralæknar og lesandi í hesum námsgreinum.

Mælt verður til, at hugtakið heilsustarvsfólk sambært ásetingini, umframt verandi fakbólkar, eisini fevnir um farmakonomar, sjúkrarøktarfrøðingar, ljósmøður, bioanalytikarar, kliniskar dietistar, radiografar, heilsurøktarar, paramedisinarar og lesandi í hesum námsgreinum. Hesir fakbólkar hava tað í felag, at teirra útbúgving ger tey serliga før fyri at skilja og meta um eina lýsing við heilivági. Skotið verður upp, at almenningur er at skilja sum einhvør, ið ikki er eitt av nevndu heilsustarvsfólkum.

Mælt verður til, at lýsing við heilivági er at skilja – í samsvari við ES-reglur – sum alt kunningarvirksemi og øll ávirkan á hugburði, undir hesum at leita eftir viðskiftafólki, ið hevur til endamáls at styrkja ávísing, útflýggjan, sølu ella nýtslu av heilivági. Allýsingin fevnir serliga um almenna lýsing við heilivági, lýsing við heilivági til persónar, ið kunnu ávísa ella útflýggja heilivág, eggja til at ávísa ella útflýggja heilivág við at geva ávísar fyrimunir, stuðla uppundir lýsingarfundir ella annað, tá persónar luttaka ið kunnu ávísa ella útflýggja heilivág.

**Mælt verður til, at forboðið fyri at lýsa við heilivági eisini verður galdandi fyri lýsingar á talgildum miðlum.**
**Mælt verður til, at ásetingin sum heimilar landsstýrinum at góðkenna lýsingar, áðrenn tær kunnu lýsast, verður strikað.**
**Mælt verður til, at hugtøkini “lýsing”, “almenningur” og “heilsustarvsfólk” o.a. í kapitlinum, verða dagførd í samsvari við ES heilivágsdirektiv.**

7. At áseta skyldu hjá heilsustarvsfólki at boða landsapotekaranum frá hjáárinum, sum eru íkomin orsakað av heilivági

Endamálið við hesum tilmæli er, at allar fráboðanir um hjáárin, sum eru íkomin orsakað av heilivági, verða savnaðar á einum stað, hjá landsapotekaranum. Hetta víðkar vitanargrundarlagið hjá landsapotekaranum og ger hann meira føran fyri at meta um, um heilivágur er ov vandamikil at nýta og skal takast aftur ella tílíkt.

Til samanberingar skulu heilsustarvsfólk eisini boða landsapotekaranum frá feilum o.ø. við medisinskari útgerð, sambært § 4 í kunngerð nr. 12 frá 9. februar 2023 um medisinska útgerð og medisinska útgerð í in-vitro diagnostikki.

Uppskot til áseting: Landsstýriskvinnan ásetir reglur um, at heilsustarvsfólk, sum hava illgruna um at hjáárin eru íkomin orsakað av heilivági, skulu boða landsapotekaranum frá hesum, undir hesum upplýsingar frá journalum og líkskoðanum.

Hjáárin, sum eru íkomin orsakað av heilivági, er at skilja sum ein skaðilig og óætlað reaktión í sambandi við nýtsluna av heilivági.

Ætlanin er, at áseta nærri reglur í kunngerð um hvørji heilsustarvsfólk og hvørjar upplýsingar skulu fráboðast, umframt freistir fyri fráboðanini.

Ætlanin er, at læknar, tannlæknar, ljósmøður, behandlerfarmaseutar og djóralæknar, umframt møgulig onnur starvsfólk, skulu boða landsapotekaranum frá, um tey hava illgruna um, at hjáárin eru íkomin orsakað av heilivági.

Ætlanin er, at heilsustarvsfólkið eftir áheitan frá landsapotekaranum skal flýggja út upplýsingar frá journalum og líkskoðanum og annað tilfar, í sambandi við viðgerðina av fráboðanini.

Ætlanin er, at heilsustarvsfólkið skal boða landsapotekaranum frá hjáárini í seinasta lagi 15 dagar eftir, at illgruni er um, at hjáárin er íkomið orsakað av heilivági.

**Mælt verður til, at áseta skyldu hjá heilsustarvsfólki at boða landsapotekaranum frá hjáárinum, sum eru íkomin orsakað av heilivági.**

# Tilmæli um, hvussu broytingarnar skulu gerast, við dagføringum í galdandi lóg, við broytingum í galdandi lóg ella við nýggjari lóg

Spurningurin um hvussu broytingarnar skulu gerast, er tongdur at hvussu avgerandi broytingarnar eru. Tað stendur í lógarsmíðsrundskrivinum[18], at snýr tað seg um avgerandi broytingar í lóggávuni, eitt nú at broyta rættarstøðuna á fleiri ella á týdningarmiklum økjum,

[18] Punkt 2.1.1. "Um broytingar í løgtingslógum" - rundskriv um lógarsmíð

er høvuðsreglan, at tað verður gjørt við nýggjari løgtingslóg. Verður tikið undir við avgerandi broytingum í hesum tilmælinum, skulu tær gerast við nýggjari lóg sambært rundskrivinum.

Mælt verður til, at býta lógina sundur í tvær serstakar lógir. Hetta er grundað á tvey viðurskifti:

1. Partur A ásetur viðurskifti hjá apotekum, til dømis starvsfólka- hølis- og fíggjarviðurskifti. Partur B ásetur viðurskifti um heilivág. Hóast heilivágur er ein týðandi partur av apoteksverkinum, merkir hetta ikki tað sama sum at endamálið og virkisøkið hjá parti A og B í lógini neyðturviliga eiga at hanga saman í einari lóg. Til dømis eru reglur um apotek og heilivág ikki gjørdar í somu lóg í Norra og Danmark.
2. Tað hevur verið eitt politiskt ynski, at dagføra part B og ávísar ásetingar í parti A í apotekara- og heilivágslógini. Flestu tilmælini snúgva seg sostatt um heilivágspartin í lógini, meðan einstøk tilmæli snúgva seg um apotekarapartin í lógini. Arbeiðsbólkurin heldur, at partur A í lógini í mestan mun eigur at vera óbroyttur, av tí at einans einstakar ásetingar í parti A hava verið viðgjørdar av arbeiðsbólkinum. Hetta eigur at vera gjørt við at býta lógina sundur í tvær serstakar lógir.

Tá mælt verður til at býta apotekara- og heilivágslógina sundur í tvær serstakar lógir, er hetta at skilja sum at gera eina broyting í verandi lóg um at strika part B, og gera eina nýggja lóg um part B – eina heilivágslóg.

Tá allur partur A í lógini verður endurskoðaður, er onki til hindurs fyri at samla lógirnar aftur.

Tilmæli hevur við sær, at ein røð av konsekvensbroytingum mugu gerast í parti A og parti C í lógini.

# Tilmæli um nýggjar kunngerðir og dagføringar og broytingar í verandi kunngerðum

## 1. At seta í gildi kunngerð um at handfara heilivág á sjúkrahúsi og øðrum viðgerðarstovnum

Í verandi lóg eru reglur ikki settar í gildi um, hvussu sjúkrahús og aðrir viðgerðarstovnar skulu goyma heilivág. Tó er heimild fyri at gera reglur um hetta í § 20: “Landsstýrið kann áseta reglur um og taka avgerð um, hvussu sjúkrahús og aðrir líkir stovnar skulu keypa, goyma og annars handfara heilivági.”

Fyri at fáa greiðu á, hvussu sjúkrahús og aðrir viðgerðarstovnar skulu goyma heilivág, verður mælt til, at áseta nærri reglur um:

1) At hava heilivág á goymslu

- heilivágur skal vera goymdur í læstum heilivágsskápi
- heilivágur til felags heilivág, skal vera sundurbýttur frá heilivági, sum er ordineraður einstaka heilivágsbrúkaranum
- heilivágur skal vera goymdur millum 15 og 25 hitastig, uttan so at annað stendur á pakninginum.

2) Starvsfólk og eftirlit

- Læknaligi stjóri á deildini ella stovninum skal hava eftirlit við, at brot ikki eru á ásetingar í hesi kunngerð og at starvsfólk, sum fáast við at handfara heilivág í teirra starvi, eru kunnaði um galdandi reglur á økinum. Er fastur lækni ikki knýttur at stovninum, kann ábyrgdin delegerast til annað starvsfólk við nøktandi vitan um at handfara heilivág
- Deildin ella stovnurin skal hava skrivligar mannagongdir fyri at handfara heilivág á ráðiligan hátt og sambært galdandi reglum
- Ábyrgdarhavandi fyri handfaringini av heilivágnum skal regluliga fara ígjøgnum og hyggja eftir heilivágsgoymsluni í samráð við apotekið, sum hevur útflýggjað heilivágin
- Deildin ella stovnurin skal føra journal yvir, hvussu ofta eftirlit hevur verið og møguligar viðmerkingar frá eftirlitinum.

**Mælt verður til, at seta í gildi kunngerð um at handfara heilivág á sjúkrahúsi og øðrum viðgerðarstovnum.**

## 2. At seta í gildi kunngerð um møguleikan hjá einstaklingum at innflyta heilivág

Í grein 29, stk. 2, nr. 2 í verandi lóg stendur, at landsstýrið kann áseta reglur um heilivág, sum ferðandi her til landið hava við sær til egna nýtslu. Heimildin er ikki brúkt og tískil eru ymisk viðurskifti ógreið.

Ógreitt er til dømis:

- Hvat egin nýtsla skal skiljast sum.
- Um líka reglur skulu vera fyri heilivágsnýtarar, ið ferðast frá einum ES ella EØS landi, ávikavist einum ikki-ES ella EØS landi
- Um líka reglur skulu vera fyri heilivágsnýtarar, ið innflyta ávikavist heilivág, euforiserandi evni og evni á listanum hjá World Anti-Doping Agency
- Hvussu tann ferðandi kann skjalprógva, at innflutt verður til egna nýtslu. Og um tað yvirskipað er tann ferðandi sum hevur próvbyrðuna
- Um krav skal vera um, at heilivágurin er keyptur í samsvari við galdandi reglur í tí landi, hann er keyptur
- Um landsapotekarin kann loyva undantøkum frá reglunum, tá lív og heilsa verður sett í váða.

*Reglur í útlondum*
*Í Íslandi*[19]

[19] https://www.government.is/library/01-Ministries/Ministry-of-HealTh/PDF-skjol/REGLUGER%c3%90%20innflutningur%20einstaklinga%20til%20eigin%20nota%20inn%20final%20tr%20SENT%20091222%20ENSKA.pdf

Ferðandi kunnu til egna nýtslu innflyta heilivág (ikki euforiserandi) frá einum ES ella EØS, í upp til 1 árs nýtslu – frá einum ikki ES ella EØS landi, í upp til 100 daga nýtslu.

Ferðandi, búsitandi í Íslandi, kunnu innflyta til egna nýtslu euforiserandi evni í upp til 30 daga nýtslu, um evni upprunaliga var keypt í Íslandi. Tann ferðandi skal kunna skjalprógva hetta. 7 daga nýtslu, um evni var keypt í øðrum landi enn Íslandi (í útgangsstøðinum).

Heilivágssløg á World Anti-Doping Agency kunnu ferðandi hava við sær í upp til 30 dagar við læknaváttan – onki bústaðarkrav.

*Í Danmark*[20]
Ferðandi kunnu til egna nýtslu innflyta ikki euforiserandi heilivág frá einum ES ella EØS landi - tað er ikki ásett eitt ávíst dagatal. Ferðandi kunnu til egna nýtslu innflyta ikki euforiserandi heilivág frá einum ikki ES ella EØS landi í upp til 3 mánaðar nýtslu.

Ferðandi kunnu ikki innflyta euforiserandi evni frá lista A í bekendtgørelse om euforiserende stoffer – til dømis cannabis. Ferðandi kunnu innflyta euforiserandi evni á lista B, C, D ella E í upp til 30 dagar nýtslu til egna nýtslu í sambandi við sjúkufyribyrgjan.

*Hoyringarsvar frá TAKS:*
"TAKS hevur sum so ikki nakra støðu til, um reglur skulu gerast, sum loyva einstaklingum at flyta inn heilivág. Vit skulu tó viðmerkja, at tað fer at krevja nógv størri umsiting hjá Taks at tryggja, at treytir til slíkan innflutning verða fylgdar.

Vit kunnu upplýsa, at eftir galdandi reglum hevur Taks lagt hald á stórar nøgdir av innfluttum heilivági. Í 2023 var hald lagt á 238 sendingar av heilivági. Í 2022 var hald lagt á 167 sendingar.

Spurningurin er eisini, um ætlanin er at allur heilivágur skal kunna innflytast av privatpersónum, eisini morfinplástur, cannabis v.m. ?

Vit skulu viðmerkja, at tað er altíð innflytarin ella tann ferðandi, sum má prógva, at vøra, sum viðkomandi innflytur ella hevur við sær, lýkur treytirnar, lóggávan setir.

Tað er trupult at siga, hvussu eginnýtsla skal skiljast. Taks metir at best hevði verið at sett avmarking í nøgd til hvørja sending og hvat ein ferðandi kann hava við. Um nøgdirnar skulu vera tær somu til sendingar og tað, sum ferðandi kunnu hava við, meta vit ikki hevur týdning fyri umsitingina, bert reglurnar eru greiðar.

Vit skulu gera vart við, at tað ber ikki til hjá Taks at eftirkanna, um heilivágur er keyptur í samsvari við galdandi reglur í tí landi, har hann er keyptur. Heldur ikki kunnu vit hava eftirlit við um talan er um heilivág, sum inniheldur euforiserandi evni ella um talan er um evni á listanum hjá World Anti-Doping Agency.

Tað er ikki nakar trupulleiki fyri Taks, at reglur verða gjørdar soleiðis, at Landsapotekarin kann loyva undantøkum frá reglunum. Taks skal tá bara hava boð um slík undantøk.

Um Føroyar hava bundið seg til líka viðgerð fyri heilivágsnýtarar, ið ferðast frá einum ES ella EØS ávikavist einum ikki-ES ella EØS landi, kann uttanríkistænastan helst betur svara."

[20] Bekendtgørelse 2022-01-23 nr. 104 om privates indførsel af lægemidler til mennesker og dyr

*Tilmæli:*
Mælt verður til, at ferðandi til Føroyar kunnu hava við sær heilivág, sum ikki er euforiserandi, til 3 mánaða egna nýtslu. Ferðandi til Føroyar kunnu hava við sær euforiserandi evni til 1 mánaðar egna nýtslu.

Orsøkin til, at mælt verður til 3 mánaðar fyri heilivág, sum ikki er euforiserandi, er, at 3 mánaðir eisini er markið fyri, hvussu leingi ávísir útlendingar sum til dømis ES og EØS borgarir, kunnu steðga í Føroyum uttan visum sambært § 3, stk. 1 í Anordning nr. 182 af 22. marts 2001 for ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven. Hetta merkir, at ferðafólk kunnu hava vanligan heilivág við sær til aææa Haraftrat kann sigast, at nógvir heilivágar eru pakkaðir at hóska til 3 mánaðar nýtslu.

Orsøkin til, at mælt verður til 1 mánaða nýtslu fyri euforiserandi heilivág er eftir fyrimynd frá Íslandi.

Mælt verður til, at reglurnar verða galdandi uttan mun til, um innflutt verður frá einum ES ella einum ikki ES land.

Heilivágurin og euforiserandi evnini skulu verða keypt í samsvari við galdandi reglur í tí landi, har tey eru keypt. Hetta fyribyrgir, at heilivágurin ella euforiserandi evnini eru keypt frá svarta marknaðinum.

Tann ferðandi skal kunna skjalprógva, at influtti heilivágurin ella euforiserandi evnini eru til egna nýtslu. TAKS kann í serligum førum seta sum treyt fyri at innflyta heilivágin, at tann ferðandi kann vísa eina læknaváttan frá lækna við autorisatión í tí landi, har heilivágurin er innfluttur frá.

Landsapotekarin kann í serligum førum gera undantak til reglurnar.

Viðmerkjast skal, at tá kunngerðin verður tilevnað, má spurningurin um ella í hvønn mun Føroyar kunnu áseta reglur um euforiserandi evni takast upp við danskar myndugleikar av tí, at euforiserandi evni ikki er yvirtikið málsøki. Harumframt má spurningurin um eftirlitið hjá TAKS viðgerast nærri við TAKS og Føroya Politi.

**Mælt verður til, at seta í gildi kunngerð um møguleikan hjá einstaklingum at innflyta heilivág.**

3. At dagføra kunngerð nr. 13 frá 31. januar 1994 um brúkarainnpakking til sertilbúningarheilivág

Verandi kunngerð ásetir, at danska kunngerðin "Sundhedsstyrelsens bekendtgørelse nr. 777 af 12. december 1989 om forbrugerpakninger til lægemidler optaget i sundhedsstyrelsens specialitetsregister" fær gildi í Føroyum við tí fráviki, at heimildir heilsustýrisins liggja hjá landsapotekaranum.

Í Danmark er kunngerðin broytt fleiri ferðir í samsvari við ES direktiv. Ein broyting í núverandi donsku kunngerðini "Bekendtgørelse 2011-07-21 nr. 869 om mærkning m.m. af lægemidler til mennesker", er til dømis, at krøv verða sett til, at heilivágsnavn og styrkia skal ásetast við

blindskrift á uttara pakkitilfarið. Hetta er ikki sett í føroysku lógina, men verður praktiserað í Føroyum, undantikið pakningur, sum er framleiddur í Føroyum.

**Mælt verður til, at at arbeitt verður víðari við meta um hendan kunngerð skal dagførast.**

4. At dagføra kunngerð nr. 85 frá 12. juni 2013 um at undantaka náttúruheilivág, vitamin- og mineralsløg og homøopatiskan heilivág frá løgtingslógini um apoteksverkið og heilivág

Verandi kunngerð ásetir, at náttúruheilivágur og siðbundin plantuheilivágur, vitamin- og mineralsløg og homøopatiskur heilivágur, eru undantikin virkisøkið í lógini.

Í donsku kunngerðini[21] eru fleiri heilivágssløg nevnd, sí myndina niðanfyri:

**Bilag 1. Liste over lægemidler, der i medfør af andre bestemmelser er fritaget fra apoteksforbehold**

1) Sera og lægemidler fremstillet af blod, vacciner og immunologiske testpræparater fra Statens Serum Institut, jf. bekendtgørelse om præparater og undersøgelser m.v. ved Statens Serum Institut.

2) Radioaktive lægemidler, jf. bekendtgørelse om radioaktive lægemidler.

3) Naturlægemidler, jf. bekendtgørelse om naturlægemidler.

4) Visse lægemidler til veterinær anvendelse, i det omfang det fremgår af bekendtgørelse om undtagelse fra apoteksforbehold af visse jern- og vitaminpræparater samt visse antiparasitære midler til dyr.

5) Vitamin- og mineralpræparater, i det omfang det fremgår af bekendtgørelse om vitamin og mineralpræparater.

6) Homøopatiske lægemidler, i det omfang det fremgår af bekendtgørelse om homøopatiske lægemidler.

7) Gasser til medicinsk brug i det omfang det fremgår af bekendtgørelse om gasser til medicinsk brug.

8) Visse håndkøbslægemidler efter Lægemiddelstyrelsens beslutning i henhold til lægemiddellovens § 5, stk. 2, jf. bekendtgørelse om forhandling af håndkøbslægemidler uden for apotek.

9) Diacetylmorphin (heroin).

**Bilag 2. Liste over lægemidler, der er fritaget fra apoteksforbehold i medfør af bekendtgørelsen**

1) Caroxin.

2) Hibitane 5 pct. koncentrat.

3) Kaliumjodid i dispenseringsformen tabletter, 200 mg.

4) Samarin.

Arbeiðsbólkurin heldur, at fylgjandi evni skulu leggjast afturat verandi kunngerð:

- Sera og heilivágur, sum er evnaður til við blóði ella immunologisk preparatum frá Statens Serums Institut
- Radioaktivur heilivágur
- Gasser til medisinska nýtslu

**Mælt verður til, at leggja omanfyrinevndu heilivágarnar aftrat verandi kunngerð og við hesum at undantaka teir frá virkisøki hjá lógini.**

5. At dagføra kunngerð nr. 113 frá 1. juli 1992 um áseting av søluprísi á heilivági, sum seinast broytt við kunngerð nr. 10 frá 13. februar 2020

Hugtakið tilbúningur skal strikast í samsvari við tilmælið nr. 5. Møguligar skulu aðrar broytingar eisini gerast í sambandi við kostnað av heilivági.

[21] Bekendtgørelse 2018-06-19 nr. 823
om lægemidlers fritagelse for apoteksforbehold sí skjal 1 og 2

**Mælt verður til, at dagføra kunngerðina í samsvari við tilmæli nr. 5. Harumframt at gera møguligar broytingar í sambandi við kostnað av heilivági.**

6. At leggja kunngerð nr. 84 frá 11. august 1989 um dygd í heilivági og kunngerð nr. 94 frá 15. august 2023 um heilivágsskrá og fyrimyndarreglur fyri heilivág saman í eina kunngerð

Mett verður, at báðar kunngerðirnar hava ásetingar um dygdina á heilivági umframt aðrar samsvarandi ásetingar.

**Mælt verður til, at leggja báðar kunngerðirnar saman í eina kunngerð, og strika ásetingar, sum eru til avlops og regulera sama øki.**

7. At dagføra kunngerð nr. 69 frá 26. juni 1991 um skrásetingarráð viðvíkjandi farmaseutiskum tilbúningi, sum broytt við kunngerð nr. 38 frá 6. mai 2015

Verandi kunngerð ásetir, at Skrásetingarráðið skal hittast í minsta lagi 4 ferðir um árið til at viðgera upptøku í skránni av sertilbúningum. Harumframt ásetir kunngerðin, at Skrásetingarráðið fyri hvørt kalendaraár sendir frágreiðing til landsstýrið, um virki ráðsins við møguligum tilmælum um broyting í skipanini viðvíkjandi skráseting og útflýgging av heilivági.

Omanfyrinevndu ásetingar verða ikki hildnar í dag.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tørvur ikki er á omanfyrinevndu krøvum til Skrásetingarráðið. Talan er um óneyðugar ásetingar, sum taka tíð og orku frá øðrum arbeiðsuppgávum. Skrásetingarráðið kemur við tilmælum til landsstýrið og viðger upptøku í skránni av sertilbúningum, tá Skrásetingarráðið metir, at tørvur er á tí. Fundir verða av og á avgreiddir talgilt ella við telduposti.

Vísandi til tilmæli nr. 5, verður mælt til at gera samsvarandi broytingar í kunngerðini.

**Mælt verður til, at strika ásetingarnar um, at Skrásetingarráðið árliga skal hava eina ávísa nøgd av fundum og geva frágreiðing um virksemi sítt.**

8. At dagføra kunngerð nr. 124 frá 7. september 2022 um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtlutan av heilivági

Í verandi kunngerð stendur:
"§ 2. Forskrift er at skilja sum ávísing frá lækna, tannlækna ella djóralækna til apotek um útflýggjan av heilivági."

Um so er at uppskot til kunngerð um behandlerfarmaseutar kemur í gildi, eigur ein fylgibroyting at gerast í forskriftakunngerðini. Hetta tí, at behandlerfarmaseutar fara at fáa ein endurávísingarrætt við atliti til forskriftaskyldigan heilivág og ein ávísingarrætt við atliti til skamtaðan heilivág. Landsapotekarin heldur, at hetta er at skilja sum ein forskrift og má forskriftakunngerðin tí tillagast.

Harumframt hava fiskaheilsulívfrøðingar ein ávísingarrætt sambært § 33 í forskriftakunngerðini. Tað er eitt feilur, at hesin ávísingarrætttur ikki er nevndur í § 2, tí tað er at skilja sum ein forskrift.

Harumframt eru aðrar minni broytingar, sum eiga at verða gjørdar.

**Mælt verður til, at allýsa, at ávísingarrætturin hjá behandlerframaseutum og fiskaheilsulívfrøðingum er at skilja sum ein forskrift sambært forskriftakunngerðini, umframt aðrar smærri broytingar.**